BAKKAFROST
ESTABLISHED 1968

Fylgiskriv 3

Umhvørvismálaráðið
Gongdin 7
Postrúm 377
FO-110 Tórshavn

Glyvrar 27-10-2025

Hoyringarsvar til uppskot til løgtingslóg um veðurlagslóg

Bakkafrost takkar fyri høvi at gera viðmerkingar til uppskot til løgtingslóg um veðurlagslóg. Bakkafrost tekur undir við høvuðsendamálinum í uppskotinum til veðurlagslóg um at minka útlátið av vakstrarhúsgassi og røkka netto-null málinum í 2050.

Bakkafrost arbeiðir áhaldandi og miðvíst við málinum um at minka um útlátið av vakstrarhúsgassi frá virksemi felagsins. Bakkafrost hevur sett sær mál um netto null útlát í 2025 og 50% minking í útláti fram til 2030. Fyri at tryggja, at veðurlagsmálini hjá Bakkafrost eru í samsvari við nýggjastu vísindini um veðurlagsbroytingar, eru útlátsmálini kannað av Science Based Targets initiative (SBTi). SBTi hevur váttað, at hesi mál eru vísindaliga grundað og í samsvari við tær minkingar, sum eru neyðugar fyri at halda heimshitan undir 1,5°C , í tráð við París-sáttmálan.

Bakkafrost stuðlar tískil arbeiðinum hjá løgtinginum at seta bindandi mál, men vilja vit tó leggja dent á, at tilgongdin skal verða haldfør, bæði fakliga og vinnuliga.

Realistiskar og fakliga grundaðar virkisætlanir (§3)

Bakkafrost tekur undir við, at lógin krevur tíðarfestar virkisætlanir hvørt fimta ár, men mælir til, at tær verða grundaðar á fakligar og vinnuligar metingar. Framtíðar virkisætlanir eiga at:

- taka hædd fyri tøkniligu og fíggjarligu fortreytunum hjá vinnuni,
- raðfesta átøkini eftir størsta útlátsminking fyri hvørja krónu, og
- fevna um greiða eftirmeting og dagføring.

TCFD-tilmælini og ES-CSRD-krøvini leggja upp til miðvísa greining og stýring av veðurlagsváðum, og metir Bakkafrost, at henda modellering eigur at verða nýtt sum grundarlag fyri føroyskar virkisætlanir, heldur enn at byggja á nýggjar metingar, sum ikki eru grundaðar á ein felags altjóða leist.

Tryggja støðuga og kappingarføra elorku

Grøna orkuskiftið krevur bíliga og støðuga atgongd til elorku úr varandi orkukeldum.

Bakkafrost mælir til:

- at landsmyndugleikar, SEV og vinnan samstarva um útbygging og prísáseting av elorku, so vinnan hevur tryggar og støðugar karmar at leggja um frá olju til el, uttan at missa kappingarføri,
- at fíggjarpolitisk amboð sum grøn lán, stuðul til orkusparandi íløgur, so vinnan kann leggja um frá olju til el uttan at missa kappingarføri.

Grøna orkuskiftið krevur eisini, at elnetið og framleiðsluorkan verða útbygd í takt við vinnuligan tørv, og at fíggingin til hesa útbygging verður partur av virkisætlanini. Hetta tryggjar støðuga og kappingarføra elorku, sum er ein fortreyt fyri burðardyggari framleiðslu.

Vinnan eigur eisini at hava møguleika at leggja aftrat framleiðsluorkuni við egnari grønnari elframleiðslu, t.d. í samstarvi við SEV, fyri at økja orkutrygd og minka um útlátið.

Sjóvinnan og altjóða reglur

Bakkafrost hevur fleiri skip og arbeiðsbátar, og orkuskiftið á sjónum er tí ein týdningarmikil partur av okkara veðurlags- og orkuátøkum. Vit mæla til, at arbeiðið við sjóorkuskiftinum verður samskipað við altjóða reglur og samtyktir (t.d. IMO og EU-ETS), so føroysku virkisætlanirnar byggja á somu støði. Hetta tryggjar, at vinnan kann fremja grønar loysnir á sjónum í takt við altjóða menning og reglur, uttan dupultarbeiði ella motstríðandi krøv.

Veðurlagsráðið (§5)

Bakkafrost metir, at eitt nýtt veðurlagsráð við avmarkaðari orku og fígging ikki er ein haldfør loysn. Í staðin eigur arbeiðið at leggjast til tann fakliga stovnin ella orkumyndugleikan, sum longu umsitur málsøkið, og sum kann savna serfrøði frá vinnu, gransking og myndugleikum eftir tørvi.

Eftirmeting og fígging

Lógin eigur at áseta eina regluliga frágreiðing til løgtingið um framgongd í útlátsminking og orkuskifti, har vinnan eisini fær høvi at leggja fram dømi um framkomnar loysnir, avbjóðingar og tilmæli. Eisini eigur lógin at geva møguleika fyri grønum stuðulsskipanum, sum kunnu hjálpa vinnuni at fremja orkuskiftið.

Framdrift og fyrisitingarligar fortreytir

Tað er ein fortreyt fyri at røkka settum veðurlagsmálum, at ferð kemur á tær grønu verkætlanir, sum longu eru mentar og klárar at setast í verk. Vinnan hevur seinastu árini lagt nógv arbeiði í at menna grønar loysnir innan elorku, biogass og burðardyggan flutning, men arbeiðið hevur staðið í bíðistøðu vegna drál og ógreiðar fyrisitingarligar mannagongdir. Skal grøna orkuskiftið fáa veruliga framdrift, eigur lógin eisini at hava sum mál at tryggja skjótari fyrisitingarliga avgreiðslu og greiðari politiskan stuðul til verkætlanir, sum longu eru til reiðar.

Samandráttur

Bakkafrost stuðlar málinum um netto-null útláti í 2050 og grønt orkuskifti, men mælir til:

1. Virkisætlanir byggja á fakliga og vinnuliga haldførar metingar, grundaðar á altjóða rammur sum TCFD og CSRD.
2. Tryggja støðuga og kappingarføra elorku.
3. Arbeiðið við veðurlagsmálum verður lagt til verandi fakliga stovn/orkumyndugleika
4. Innføra regluliga eftirmeting og møguligar stuðulsskipanir.

Vinarliga

Regin Jacobsen

Stjóri

P/F Bakkafrost